# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 24. mars 2011

Møtt vóru: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Niels Olaf Eyvindsson, Herdis Jensen, Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.

Fundurin varð settur kl. 18.00.

1. **Uppskot til byggisamtykt 2011 - 2024.**
   Fyrsta uppskot frá Kára Thomsen til nýggja byggisamtykt fyri Hvalbiar Kommunu. Samtykt varð at taka ein fund við Kára Thomsen fríggjadagin 1. apríl 2011 kl. 16.00.

2. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**

   **Vega- og Havnanevndin:**
   Skriv frá Øssur Schrøter Thomsen um parkering við Sandvíkar kirkju.

3. **Málsviðgerð síðani síðsta fund:**

   **Vega- og Havnanevndin:**
   **1)** Almennur vegur við matr. nr. 142b. Vega- og Havnanevndin saman við borgarstjóranum hava verið á staðnum og kannað umstøðurnar. Samtykt varð, at Vega- og Havnanevndin kannar, hvat kostnaðurin verður.
   **2)** Vegurin við Bakkhús – skriv er sent til Asbjørn Mortensen hjá Landsverk.
   **3)** Skriv frá smábátaeigarum – samtykt varð at hava almennan fund 29. apríl við luttøku av LBF, Landsverk og HMP Consult.
   **4)** Vegurin á Hólum – samtykt at fáa HMP Consult at koma við uppskoti til loysn á málinum.
   **5)** Skriv frá Øssur Schrøter Thomsen – samtykt varð heldur at kanna møguleikan at gera parkeringsøki uppi yvir vegnum.
   6) Innkomið tilboð frá HJ Asfalt og frá Landsverk. Samtykt varð at taka av tilboðnum frá HJ Asfalt.

   **Trivnaðarnevndin.**
   Uppskot um tilboð uppá at klæða skúlan – arbeitt verður víðari við málinum.

   **Tekniska nevnd:**
   Samtykt at skriva til Búnaðarstovuna viðv. hagapartinum í Prestfjalli – sunnari partur.

**4. Ikki alment mál.**

Kunnað varð um ymisk mál.

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundurin lokin kl. 20.45.